## DAGSINS MEINING

# Flokksleiðari í tvístøðu

Sambandsflokkurin hevur altíð verið samhaldsfastur við bróðurflokk sín Venstre i Danmark. Hetta hevur serstakliga verið galdandi fyri fólkatingsumboðanina, tá Venstre hevur havt stjórnarvaldið í Danmark. Hinvegin hevur sambandsflokkurin als ikki verið serstakliga samstarvshugaður við donsku stjórnina um aðir enn danski vinstriflokkurin sótu við valdinum. Tað er heldur ikki sørt, at Sambandsumboðini á Fólkatingi hava gjhørt sær dælt av hesi støðu bæði.

Sostatt hevur ein danskur forsætisráðharri úr vinstraflokkinum altíð kunnað roknað við einum føroyskum fólkatingsumboðiði úr sambandsflokkinum. Men nú er vent í holuni við tað at forkvinna Sambandsflokksins hevur boðað frá, at hon ikki longur tekur undir við Føroyapolitikkinum hjá forsætisráðharranum. Orsøkin er sjálvsagt tann, at stjórinin hevur givið føroyska fullveldislandsstýrisnum frítt at fara. Mótsett stjórnini hjá Nyrup, ið royndi at halda uppá Føroyar, hevur Fogh Rasmussen boðað frá,at tað stendur føroyingum púra frítt at fara úr ríkinum, um teir ynskja tað. Hetta er ein demokratisk støða og tann einasta rætta støða ein demokratisk stjórn kann hava.

Lisbeth Petersen kortini er komin í eina álvarasama politiska tvístøðu, tí hon forvæntar, at ein donsk vinstrastjórn skal mótarbeiða føroyskum fullveldisætlanum. Men her hevur hon forroknað seg tí, ein donsk stjórn í longur kann loyva sær at mótarbeiða demokratisku avgerðunum hjá føroysku tjóðini. Velja vit at loysa, má damnsak stjórnin akta vilja Føroya fólks. Hetta kemur sjálvsagt illa við hjá Sambandsflokkinum og spennandi verður at síggja, hvussu flokkurin fer at takla hesa nýggju støðuna.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ein oyggj – tvey fólk ella Ein oyggj – eitt fólk

**Ólavur Rasmussen**



Áðrenn Berlinmúrurin fall var Týskland klovið í tveir partar. Eysturtýskland var tilafturskomið og útarmað, meðan Vesturtýskland var framkomið og eitt av heimsins ríkastu londum. Eg var sjálvur staddur í Berlin tá ið múrurin fall og gloymi eg ongantíð aftur róman og søguligu umskaringina, sum hendi beint fyri eygunum á mær. Berlinmúrurin var einki minni enn ein tragedia fyri týska fólkið og restina av Europa. Ella við øðrum orðum, Týskland var eitt land, men tvey fólk.

Mikukvøldið 5. november 2003 var fundur á Hotel Øravík um kommusamanlegging í Suðuroy. Nógv fólk hevði leitað sær til Øravíkar og var hetta ein stak áhugaverdur fundur. Ja, einki minni enn ein søguligur fundur. Upprunin til fundin er ivaleyst tiltakið, sum Tvøroyar kommuna hevur tikið stig til, at spyrja sínar borgarar, hvørja støðu tey hava til kommunusamanlegging.

Á fundinum í Øravík komu ymisk sjónarmið til greinar, men millum fundarluttakararnar var breið semja um, at tíðin er komin til, at Suðuroyggin eigur at skipast sum ein kommuna. Onkur skeyt upp, at Suðuroyggin bleiv skipað sum tvær kommunur, men hesum tóku flestu fundarluttakararnir og flestu borgarstjórarnir ikki undir við, við teirri próvførslu, at so enda við bara í somu støði sum nú, í toganini millum syðra og norðara part av oynni.

Eg skilji væl at fólk eru góð við sína gomlu kommunu, og at tað kann vera torført at sleppa vanahugsan fyri borð. Men støðan í Suðuroynni er so álvarsom nú, at tað er neyðugt við nýggjum hugflogi, miðvísari hugsan og djørvum avgerðum. Ikki tí, ein samanlegging eigur ikki at fremjast bara tí at talan er um samanlegging, eins lítið og sundurbýtið eigur at varðveitast bara tí at talan er um sundurbýti. Tað avgerandi er, hvat gagnar oynni og okkum suðuroyingum.

Høvuðsargumentið fyri ikki at vilja leggja saman er, at so missir fólkið tað neyva sambandið til lokalu umsitingina. Hetta haldi eg er púra rætt tá talan er um t.d. ES, tí tað er so ómetaliga langt frá t.d. Aberdeen í Skotlandi til øgiliga beurokratiið í Strassbourg og Bruxelles. Men her á oynni er støðan ein heilt onnur, tí øll kenna meira ella minni hvønn annan, so nærdemokratiið er ikki í vanda um ein felags miðfyrisiting verður placerað miðskeiðis á oynni, t.d. í Hovi. Ein slík placering hevði eisini staðfest til lítar, at vit eru ein oyggj og eitt fólk. Eftir er so bara at fáa gjørt Hovstunnilin eftir leistinum hjá Peturi Hammer niðri í Dalinum beina leið til Øravíkar, sum allir suðuroyingar eru samdir um. Alt annað er vitleyst!

Fyrimunirnir við eini samanlegging í eina kommunu haldi eg eru óteljandi. Finnleif Guttesen, Nita Næs, Kristin Michelsen, Wiberg Sørensen og onnur hava longu víst á fleiri ágóðar. Sum nú er detta ørgrynna av málum niðurfyri, tí vit suðuroyingar ikki kunnu samjast um placeringarnar. Fáa vit ein felags kommunalan pengakassa er tað líkamikið hvar stovnar verða placeraðir, tí alt endar í sama kassa og kemur allari oynni til góðar. So kunnu vit draga eina línu og krevja okkara rætt. Her hava vit nógv at læra av norðoyingum, sum, so ósamdir teir eru, duga at standa saman tá ið á stendur, og sum tí eisini fáa nógv burtur úr. Ein annar stórur fyrimunur er ein effektivari miðfyrisiting, soleiðis at øll oyggin er felags um øll mál, samtykt av einum felags býráði, og ikki sum nú, har t.d. barnaverndir og bókasavn er tægað sundur í kommunalar eindir. Harumframt er hópurin av nevndarsessum at spara, peningur, sum kann nýtast til meira týðandi mál, sum fyirsitingin skal loysa. Og ikki minst, við einum felags kommunalum pengapolitikki og pengakassa missa okkara landspolitikarar, sum umboða Suðuroynna, grundarlagið fyri at draga hvør sína línu, sum teir eru ekspertar í í dag, og sum er ein vanlukka fyri Suðuroynna.

Góði suðuroyingar. Vit hava ikki brúk fyri einum Berlinmúri í Suðuroynni. Latið okkum sleppa gomlum aggi til frama fyri nýhugsan og framtíðarvisiónum. Hetta er ein livilig oyggj og vit hava ikki ráð til at missa ungdómin, tí uttan ungdóm er eingin framtíð. Og gloymið ikki, at framtíðarkorini nú liggja í okkara hondum.

Latið okkum skipa okkum sum ein kommuna, ein oyggj - og eitt fólk.

# Gevst nú, Bill, meðan væl er!

**Randi í Jógvanstovu**

Steðga áðrenn tú ger meiri skaða, enn tú longu hevur gjørt.

Tú ber teg at sum ein elefantur í einum postalínshandli, fonglar runt í einum myrkri, tú aldri verður førur fyri at skilja.

Ocean av tárum, tankar av einari dimensjón, tú aldri, frá nú av og til dómadags, fer at skilja, liggja millum teg og tær kvinnur, ið taka avgerð um fosturtøku.

Trúgv mær, vinurin, ikki verður avgerðin tikin fram eftir fummum. Ivist onga løtu í, at tú ert »eitt gott fólk« og gjarna vil fremja góðar gerðir. Alt gott um tað.

Sum »familjumálaráðharri« hevur tú stórt vald. Ger brúk av hesum á ein hátt, sum er til frama fyri »Familjuna Føroyar«. Ansa eftir, ikki at traðka á tær, ið longu liggja. Tær hava pínst lóg leingi. Teirra sár eru so djúp, at **tú** eigur at lata tær hav afrið. Nýt tað valdið, tú hevur, konstruktivt.

»En smule pli« på rette sted og i rette sammenhæng kan ganske udmærket erstatte din manglende elegance, Bill, eller hva?

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Politiskt samstarv, heldur enn rættstundis umhugsni?

**Bjarki Mohr**



**Hvussu langt vil Løgmaður loyva landstýrismanninum í lógarmálum at fara í sjálvsøkni.**

Seinastu tíðina hevur rættuligt rok staðist av, at landsstýrismaðurin í Lógarmálum, Høgni Hoydal, sjálvsøkin - við eini kunngerð - hevur lagt forðingar fyri, at fíggjarstovnar kunnu halda áfram við at nýta Gjaldsskipanina til handilsligt endamál.

Upprunin til lógina tekur støði í einari tíð, har føroyska samfelagið er í sváraari búskaparligari kreppu, og er tí skiljandi hví, politiska skipanin legði dent á at smíða lógir, hvørs endamál varð - í størst møguligan mun - at varðveita føroyska vitan og arbeiðspláss, hervið eina samskipan av dátuviðgerð, í Føroyum.

Eftirfylgjandi samgongur, og landstýrismenn, ið hava varða av økinum - uttan mun til politiskan flokk og samanseting av samgongu - hava dugað at umsitið lógina við skynsemi, soleiðis at henda ikki hevur verið til ampa fyri vanligum fyritakssemi.

Upprunastøðið er, at lógin skal tryggja/regulera persónsvernd hins einstaka, tá persónsupplýsingar verða viðgjørdar. Í londum rundanum okkum er siðvenja, at skilja millum tvinni hugtøk: **viðkvom dáta og vanlig dáta, trygg lond og ótrygg lond.**

Við viðkvom dáta skilst, átrúnaður, politiskur litur, kynslív, lógarmisbrot v.m., meðan vanlig dáta hava eitt heilt annað sermerki.

Vanlig dáta bera merki av, at tað eru upplýsingar, ið hvør einkultur - tað verið seg persónur, virki ella land - kann gera nýtslu av dagliga. T.d. telefonnummar, bústaðarupplýsingar v.m., her undir eisini sendari og móttakari av peningaupphæddum, ið krevst, skal ein daglig gjaldsmiðling fara fram.

Næsti spurningurin er so, hvussu og hvar hesi dáta verða viðgjørd. Hvussu dáta verða viðgjørd í dag er ofta meira trupult at skilja enn áður, tó kann sum heild sigast, at elektroniski miðilin í stóran mun hevur avloyst handaligu viðgerðina.

Besta dømið um menningina er, at vit í dag flyta pening millum persónar og lond við elektroniskum skipanum, meðan vit fyri bert fáum árum síðani, nýttu kontantan pening, kekkar og post.

Tá talan er um hvar dáta verða viðgjørd, skilir man vanliga millum trygg og ótrygg lond. Tað ið eyðkennir trygg lond er, at tað valdar politiskur friður (demokrati), búskaparligt støðufesti, og at samfelagsskipanir, herundir peningastovnsskipanir og lógarkarmar, í stóran mun, eru sambærlig millum hesi lond. Tað øvugta er galdandi fyri lond, ið vit vanliga nevna ótrygg lond.

Í eini roynd at lýsa hugtøkini, er myndin niðanfyri sett upp:

| DÁTA \ LOND | Trygg | Ótrygg |
|---|---|---|
| Vanlig | Geiri 1. Loyvt | Geiri 2. Avmarka |
| Viðkvom | Geiri 3. Avmarka | Geiri 4. IKKI LOYVT |

Sum tað framgongur á myndini omanfyri, er tað ikki líkamikið hvørji dáta talan er um, og heldur ikki hvar hesi dáta verða viðgjørd. Dáta ið liggja innan geirarnar 2 og 3 royna myndugleikar vanliga at avmarkað mest møguligt, meðan dáta innan geira 4 vanliga ikki eru loyvd millum landamørk.

Dáta, ið liggja innan fyri geira 1, eru loyvd, tí her er talan um vanlig dáta, hvørs endamál er at tæna persónligum ella handilsligum viðurskiftum.

Tað hevði verið skiljandi um løgmálaráðharrin hevði ynskt at tálma (steðga) útflutninginum av viðkvomum dáta, og tað hevði somuleiðis verið skiljandi, um løgmálaráðharrin ynskti at tálma (steðga) útflutningi av øllum dáta til lond, ið verða mett ótrygg.

Tað óvæntaða, og sera undrunarsama er, at løgmálaráðharrin - í ansøgn til vanligan hugsunarhátt - als ikki skilir millum vanlig og viðkvom dáta, og á hinari síðuni trygg og ótrygg lond.

Tvørturímóti. Løgmálaráðharrin nýtir heimild sína til at steðga ferðsluni av fíggjarligum dáta - ið má eyðmerkjast sum verandi vanlig dáta, og í allar mátar meinaleys dáta, havandi persónsvernd hins einstaka í huga - við øll lond, herundir Danmark, ið kann bjóða viðskiftafólkum ein óreingiligan tryggleika, á økinum.

Við øðrum orðum, steingir løgmálaráðharrin allan samhandil við onnur lond, uttan mun til hvat eyðkenni útfluttu dátaini hava. Hetta kann tykjast undrunarvert, havandi í huga, at løgmálaráðharrin sjálvur, í undanfarnum viðgerðum, hevur litið dønum í hendi at umsita *Føroysku Tinglýsingina,* sum má sigast at innihalda viðkvom dáta.

Í sambandi við lógaruppskotið, hava uml. 8 ymiskir áhugabólkar verið hoyrdir. Felags fyri allar er, at teir lasta lógarsmíðið. Fíggjarmálaráðið sigur beinleiðis í sínum skrivi, at teir mæla frá, at man ger tílíkar lógir, tí hesar forða vinnuni og skerja kappingarføri.

Kunngerðin, løgmálaráðharrin setti í gildi - hóast Tingsins vilji ikki var til lógarbroyting á økinum - gevur fíggjarvinnuni serviðgerð, men tíverri **ikki** á ein positivan hátt. Hon avmarkar framtíðarmøguleikar fyri samvinnu við onnur lond á gjaldsmiðlaøkinum. Altjóða gjaldsskipanir eru sera orku- og fíggjar krevjandi, og havast skal í huga, at sjálvt Danmark metir seg lítlan, tá hugsa verður um hetta menningarøki.

Tað hevur tí avgerandi týdning, at politiska skipanin er varug við, at talan er ikki bert um ein trupulleika hjá fíggjarstovnunum, men ein samfelagstrupulleika. Tað er ein sannroynd, at fyrisitingarligi parturin av einum altjóða samstarvi alloftast fer fram við tøkniligum loysnum, og er tað tí avgjerandi, at lógarverkið megnar at taka hædd fyri hesum.

Kann ovasti myndugleiki í Føroyum - Løgtingið, og ikki minst Løgmaður - liva við, at løgmálaráðharrin í sjálvdrátti lýsir kunngerðir, ið eru í ansøgn við viðgerðina í Løgtinginum, sum avgjørdi at beina málið í rættarnevndina? Rættarnevndin valdi seinni **ikki** at taka støðu í málinum?

Kann ovasti myndugleiki í Føroyum liva við, at løgmálaráðharrin, ið umsitur lógir landsins - møguliga - kann dømast fyri at bróta somu lógir, við at lýsa kunngerðina?

Forkvinnan í Dátueftirlitinum - sum Føroya Løgting hevur latið upp í hendurnar at umsita lógina - gav herfyri greitt til kennar, at lýsta kunngerð als onki hevur við dátuviðgerð at gera, men at talan hinvegin er um eina vinnupolitiska forðing.

Kann Føroya Løgting lata sær tílíkt lynda?

# Múrur millum Ísrael og Palestina, meðan USA og Kina mangan kasta saman

**Frásøgn úr ST í New York**

**Jógvan Durhuus**



Kom til New York seinnapart sunnudagin 19. okt. 2003 saman við umboði úr Grønlandi og umboðum úr Danmark. Mánamorgunin varð fundur settur á donsku sendistovuni, har kunnað varð um mannagongdir á sendistovuni og á ST-fundunum, og um evnir, sum vóru uppi í løtuni í ST. Sum vituligt er, so vóru Miðeystur og Irak frammalaga á skránni, har viðurskiftini framhaldandi eru ótrygg. Hetta hevur eisini merkt orðaskiftið farnu dagarnar bæði á Aðalfundinum og í Trygdarráðnum.

### Afrika eigur 70% av málunum, men Miðeystur eigur umrøðuna

Nú fjúrtan dagar eru farnir aftur um bak, skal eg taka saman um nakað av tí, sum farið er fram. Hóast 70% av teimum um 200 málum, sum eru á dagsskrá til aðalfundin hava tilknýti til Afriku, so eru Miðeystur - Palestina og Ísrael saman við Irak - tey lond, sum fáa mestu umrøðu.

### Saklig sjónarmið frá bæði Palestina og Ísrael

Áhugavert var at hoyra umboð fyri Ísrael og eygleiðaran fyri Palestina bera røður sínar fram í stóru fundar-høllini í ST. Hesar røður vóru báðar sakliga bornar fram- heldur lýsandi støðuna frá báðum síðum enn kegl, - og tá tú hevði lurtað eftir báðum pørtum, so høvdu báðir partar grein í sínum máli.

### Múrurin skilir ST-tjóðirnar

Tó er nakað, sum skilur álvarsliga, og fær nógv av av limalondunum at verða ósamd við Ísrael, - og er tað tann múrurin, sum Ísrael byggir fyri at verja seg móti atsóknum frá Palestina.

Hesin múrur gyrðir ikki bara Ísrael inni, men skilir á nógvan hátt palestinar sundur, og tað er serliga hetta, sum størsta ónøgdin er um. Væl kann múrurin nýtast sum verja, men oyðilegging av jørð, felling av trøum og vøkstri, og hin psykologiska ávirkanin, hetta byggiverk fær á sakleys fólk, sum ikki kunnu ferðast millum sini egnu, er eitt av heitastu kjakevnum í hølunum av hesari bygging, sum framvegis er í gongd.

### Stirvna skrivstovuveldið í ST

Annað kjakevni í ST-háborgini er bygnaðurin, sum seinastu 10 árini hevur verið fyri stórum atfinningum og nógvum royndum at gera broytingar, uttan serligt hepni. Sagt verður at mál samtykt á sjálvum aðalfundinum verða endurtikin og broytt í tað óendaliga.

Mál, sum verða samtykt á aðalfundinum, hava ikki meiri vekt mótvegis stjórnunum hjá teimum ymisku limalondunum enn vælmeintar áheitanir.

### Trygdarráðið er sterkasti leikari

Øðrvísi er við Trygdarráðnum, sum verður mett, sum mest týðandi forum í øllum ST.

Trygdarráðið hevur 15 limir. 5 fastar limir, sum eru Bretland, Frakland, U.S.A, Kina og Russland. Aðalfundurin velur síðani 10 aðrar limir millum tey lond, sum ikki eru fastir limir at sita í tvey ár í senn.

Føstu limirnir hava vetorætt, so um ein av føstu limunum ikki atkvøður, so er eitt uppskot fallið, - annars skulu i minsta lagi 9 atkvøður til fyri at eitt uppskot er samtykt.

Er eitt uppskot samtykt í Trygdárradnum, so er hetta treytaleyst bindandi fyri eitthvørt limaland, og her er tað, at serliga Týskland, Spania og Italia ikki kenna seg serliga væl, tá Bretland og Frakland saman við hinum spæla við musklunum. So eisini her eru uppskot um broytingar í bygnaðinum væntandi, hóast ringar vónir um broytingar.

### Noreg hevur sess - Danmark ætlar sær

Noreg hevur lim í Trygdarráðnum í løtuni, men tá teirra tíð er runnin, so meta danir at teir hava ein møguleika at fáa ein lim. Men einki er avgjørt fyrr enn valið er av um eitt hálvt av, hóast lyftir frá øðrum londum benda á stuðul til Danmarkar. Hetta er bert eitt dømi, um hvussu tilvildin kann ráða. Eitt liggur tó fast, og tað er, at valdu londini - smá ella lítil - eiga formansskapin í Trygdarráðnum uppá skift í ein mánað í senn.

So løgið tað ljóðar, so eru Kina og U.S.A tey lond, sum oftast draga eina línu í málum , sum verða viðgjørt í Trygdarráðnum. Kanska eitt dømi um, at júst Kina og USA eru nýggju stórveldini í heiminum.

At enda - áhugavert er at uppliva stórbýin New York við sínum yðjandi lívi.

# Útgreining til Randi í Jógvansstovu

**Óli Jacobsen**

Um nakar skuldi ivast tey sjónarmið, sum fakfelagskvinnan Randi í Jógvansstovu setti fram í blaðnum leygardagin, so eru tey hesi:

Tað er í lagi, at føroyingar, sum hava verið upp til 15 ár í einum starvi, verða setti til viks av útlendingum, sum frammanundan bert eru settir fyri 6 mánaðir.

Hetta haldi eg ikki, og er hetta munurin millum okkum bæði.